Kyndil-VB 29-25 (12-11):

# Bjarging í eygsjón

*Aðru ferð í ár vann Kyndil á VB, og júst hesir báðir sigrarnir tykjast nú at gerast bjargingin hjá havnarliðnum*



## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 9 | 9 - 0 - 0 | 611 | 370 | 241 | 30 |
| 2 | Neistin | 10 | 6 - 1 - 3 | 499 | 433 | 66 | 21 |
| 3 | Stjørnan | 9 | 5 - 1 - 3 | 514 | 432 | 82 | 20 |
| 4 | VB | 9 | 5 - 1 - 3 | 491 | 498 | -7 | 17 |
| 5 | StÍF | 8 | 3 - 0 - 5 | 384 | 469 | -85 | 7 |
| 6 | Kyndil | 9 | 1 - 1 - 7 | 473 | 561 | -88 | 6 |
| 7 | Sóljan | 10 | 1 - 0 - 9 | 407 | 616 | -209 | 4 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 9 | 8 - 0 - 1 | 632 | 534 | 98 | 27 |
| 2 | Neistin | 9 | 7 - 0 - 2 | 657 | 552 | 105 | 24 |
| 3 | StÍF | 8 | 6 - 0 - 2 | 558 | 539 | 19 | 18 |
| 4 | Kyndil | 9 | 4 - 1 - 4 | 497 | 552 | -55 | 11 |
| 5 | Tjaldur | 9 | 3 - 0 - 6 | 534 | 595 | -61 | 10 |
| 6 | H71 | 9 | 0 - 2 - 7 | 582 | 633 | -51 | 8 |
| 7 | KÍF | 9 | 1 - 1 - 7 | 552 | 607 | -55 | 7 |

## Máltindarnir

**Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ásta Petrauskiene | Sóljan | 180 | (27) |
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 164 | (51) |
| Ioana Rápa | VÍF | 150 | (36) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 143 | (61) |
| Gabriella Fekete | VB | 123 | (32) |
| Regina Radó | VB | 104 | (24) |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 100 | (14) |
| Ileana Manulescu | StÍF | 100 | (17) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 100 | (37) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 95 | (8) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 93 | (16) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 87 | (1) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 84 | (4) |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 82 | (13) |
| Gunnleyg Berg | Neistin | 81 | (13) |

**Menn:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Bjarni Wardum | H71 | 155 | (33) |
| Heini Joensen | Neistin | 155 | (46) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 132 | (15) |
| Høgni Klein | Kyndil | 124 | (10) |
| Sámal Joensen | VÍF | 124 | (21) |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 119 | (12) |
| Finnur Hansson | H71 | 117 | (23) |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 116 | (17) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 116 | (35) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 114 | |
| Durica Tomic | KÍF | 110 | (33) |
| Ingi Olsen | VÍF | 105 | (12) |
| Artur Johansen | StÍF | 104 | (11) |
| Iljan Topic | KÍF | 102 | |
| Áki Olsen | VÍF | 98 | (11) |

**Fyri aðru ferð í ár vunnu Kyndils kvinnur á VB, og nú tykist vandin fyri niðurflyting at vera skumpaður nakað burtur**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Besta kvinnuliðið hjá Kyndli hevur staðið seg alt annað enn væl hetta kappingarárið. Vónbrot oman á vónbrot hava viðført, at liðið stóran part av vetrinum hevur verið í beinleiðis vanda fyri niðurflyting. Í grundspælinum var at kalla bert ein einstakur glotti, tá tær út- og niðurspældu VB í dystinum í Havn, og kanska var tað júst hetta, sum gjørdi, at tær grønu høvdu gott treysti, tá tær nú aftur fingu vitjan av VB.

### Høvdu munin

VB-kvinnurnar vóru kanska eisini nakað skerdar. Vanligi málverjin, Timea Vargeo, verður neyvan aftur at síggja á vøllinum í ár, og tá Guðrun í Lágabø ikki fekk verið við vegna arbeiði, var Ingva Vestergaard hesaferð einsamøll um at verja málið. Hartil kom, at VB bert hevði átta útileikarar við til dystin, so alt í alt var liðið heldur skert.

Tað skal tó ikki sigast, at tað var hetta, sum var orsøkin til, at tað aftur eydnaðist Kyndli at vinna heimadystin á VB. Kyndil var stórsta partin av dystinum betra liðið. Hóast VB frá byrjan legði nógva orku í at steðga Anniku Ljósstein og Lotte Sørensen, so megnaðu hinar á liðnum alla tíðina at bróta ígjøgnum VB-verjuna.

Longu frá byrjan royndi heimaliðið at leggja sjógv ímillum, og tó at VB so hvørt megnaði at svara aftur, so var dystargongdin sum eitt væl spent elastik, har Kyndil hevði fatur í rætta endanum. Munurin toygdist nakað, minkaði síðani aftur, toygdist aftur og so framvegis. Alla tíðina var tað Kyndil, sum dróg á, men VB treiskaðist tó alla tíðina.

Áður hevur tað ofta verið so, at Kyndil hevur mist mótið, tá liðið hevur havt nakað at mótburði, men soleiðis var ongan tíð sunnudagin. Tær mistu hvørki leiðsluna ella trúnna uppá, at hendan kundi haldast, og serstakliga seinastu løtuna kom hetta til sjóndar.

Fyrst hevði Kyndil við 10 minuttum eftir lagt seg á odda við fimm málum, og tá VB so hevði hug at svara aftur, gjørdi Kyndil bart. Trý mál í tveir minuttir setti alt upp á pláss, og so kundi VB ikki gera stórt meira.

### Avgerandi

Fyri bæði liðini var útfallið av dystinum rættiliga avgerandi fyri kappingarárið. Kyndil slapp sær við sigrinum tvey stig burtur frá Sóljuni í botninum, og hesi kunnu vísa seg at hava avgerandi týdning. Sóljan eigur ein dyst til góðar frá grundspælinum, men eftir úrslitunum í seinastuni at døma, so fer hesin neyvan at geva stig, og um so er, so hevur Kyndil helst ráð at tapa dytstin á Giljanesi, sum annars tóktist at kunna gerast ein rættur lagnudystur.

Fyri VB merkti tapið, at tær allar helst eru dotnar niður ímillum í stríðnum um heiðursmerki. Hetta er nú blivið til eitt stríð millum Neistan og Sóljuna, og er fremsta orsøkin til hetta júst teir báðir dystirnir í Havn móti Kyndli, har VB einki hevur fingið.

### Dysturin í tølum

**Kyndil-VB 29-25 (12-11)**
Málskjúttar:
Kyndil: Ann Mari Wang 6, Lotte Sørensen 6(3), Linda Weihe 4, Ann Hansen 4, Jensia Petersen 3, Annika Ljósstein 2, Rakul N. Joensen 2, Marjun Tróndarson 1, Palma Petersen 1
VB: Regina Radó 7(2), Gabriella Fekete 7, Durita Rouch 5, Sólrun Krosslá 3, Margreth Augustinussen 2, Rannvá Augustinussen 1
Brotskøst: Kyndil 6, VB 2
Útvísingar: Kyndil 3, VB 1
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Páll Nólsoy.



ÍF — Mjølnir 3-1 (18-25, 25-22, 25-23, 25-20)

# ÍF vann tryggan sigur

**Sjálvt um tað var Mjølnir sum byrjaði best, vóru tað fuglfirðingar, sum vunnu seinasta heimadystin í hesum kappingarárinum.**

FLOGBÓLTUR, MENN
*Sveinur Tróndarson*

Fuglfirðingar hava fótað sær eftir tapið í steypafinaluni fyri tveimum vikum síðani. Seinastu tveir dystirnar hava fuglfirðingar vunnið sínar dystir og tað vil siga, at teir enn kunnu fáa eitt avgerðandi orð at siga um, hvør skal vinna meistaraheitið í ár. Fuglfirðingar skulu nevniliga í dyst móti Fram í Havn næsta leygardag, og vinna teir tann dystin, spæla teir meistaraheitið upp í hendurnar á Fleyr.

Um vikuskiftið hevði ÍF vitjan av Mjølnir, sum er botnlið í meistaradeildini hjá monnum. Og sjálvt um tað bara er tað eina plássið millum liðini, hevur leik liga gongdin í seinastuni víst, at tað er so stórur munur á leikliga tilfarinum, at ÍF átti at vinna ein rættiliga greiðan sigur.

So einfalt var tað kortini ikki, og tað vóru eisini klaksvíkingar, sum byrjaðu best. Í roynd og veru so væl, at teir vunnu fyrsta sett. Næstu settini vóru tað so fuglfirðingar sum settu dagsskránna og teir vunnu tey trý settini sum eftir vóru. Tó skal sigast, at munurin í øðrum og triðja setti var lítil og at talan tí hevur verði um ein rættiliga javnan dyst.



*Júst ÍF og Mjølnir fáa komandi vikuskifti avgerandi leiklutir, tá FM-heitið skal plaserast*

Nú næstseinasta umfar er farið aftur um, verða eyguni vend móti seinasta vikuskiftinum, har hesi bæði liðini eru ein partur. ÍF skal sum sagt spæla móti Fram, sum er annað boðið upp á ein meistara, meðan Mjølnir skal spæla móti oddaliðnum Fleyr, og tað verður spennandi at síggja, hvussu tað fer at gangast.

Tað skal ikki vera nøkur loyna, at tað verður eitt stórt vónbrot hjá Fleyr, um teir tapa dystin móti Mjølnir. Gamaní skulu vit hava virðing fyri Mjølnir og vit skulu eisini hava orðini hjá Jan Hentze í huga, um at Mjølnir altíð stríðist tá Fleyr stendur hinumegin netið. Samstundis skulu vit hava í huga, at Mjølnir longu hevur vunnið ein dyst á Fleyr í hesum kappingarárinum. Vit vita væl, at tað hendi í fyrru hálvu, og at Fleyr hevur vent gongdini síðani, men, men ...

Skráin hjá Fram er ikki stórt øðrvísi. ÍF hevur fleiri ferðir víst, at teir ikki lata seg syfta at størru liðunum, og tí fær Fram ongan lættan dyst næsta leygardag. Yngra havnarfelagið veit tó, at skal meistaraheitið takast frá Fleyr — og tað er helst einki teir heldur kundu hugsað sær — so skal dysturin móti ÍF vinnast.

Hyggja vit í bøkurnar, fáa vit at vita, at alt skil sigur, at Fram og Fleyr vinna sínar dystir, og at Fleyr gerst meistari, men, men ...

## Petur er formaður



*Petur Skarðenni úr Leirvík er nýggjur formaður í fótbóltsdómarafelagnum*

Felagið hjá føroyskum fótbóltsdómarum varð hetta vikuskiftið savnað á Hotel Føroyum.

Á skránni vóru tvinnir lutir. Ein var árliga dómaraskeiðið, har dómararnir hesuferð høvdu vitjan av navnframa dananum, Peter Mikkelsen, og sum skilst á lagnum, vóru luttakararnir sera væl nøgdir við skeiðið. Ein partur av skeiðnum var annars ein heldur forkunnugur pallborðsfundur við luttøku frá venjar-, spælara-, dómara- og fjølmiðlasíðuni. Tann sonvenda »fótbóltsfamiljan«, og hóast fatanirnar ikki vóru heilt eins frá øllum pørtum, so er einki at ivast í, at ein slíkur kjakfundur kann vera viðvirkandi til framhaldandi menning fyri dómararnar.

Hin luturin, sum eisini var á skránni um vikuskiftið var árligi aðalfundurin. Her skuldi nýggjur formaður finnast, nú Erling Eysturoy ikki ynskti at halda fram í sessinum, og varð Petur Skarðenni úr Leirvík kosin sum nýggjur formaður. Erling Eysturoy heldur tó fram í nevndini sum skrivari, og afturat sær hava teir báðir Jákup Martin Kjeld úr Runavík, meðan Jens Brattaberg úr Vági er tiltakslimur. Lassin Isaksen, sum hevur verið í nevndini í drúgt áramál, tók ikki við afturvali.

SÍ — Fleyr 3-1 (26-24, 22-25, 25-14, 25-19)

# Fleyr má bíða eina viku enn

**Tað eydnaðist ikki Fleyr at vinna á sørvingum sunnudagin og tí mugu havnarmenninir brynja seg við toli í eina knappa viku. Vinna teir dystin móti Mjølnir eru teir meistarar. Tapa teir eru Fram meistarar**

FLOGBÓLTUR - MENN
*Sveinur Tróndarson*

Landskappingin í mansflogbólti er ikki avgjørd enn. Tað er hon ikki av tí, at Fleyr tapti útidystin í Sørvági sunnudagin, og tað vil siga, at tað framvegis eru tvey lið, sum kunnu vinna meistaraheitið í mansflogbólti í ár. Fleyr, sum framvegis liggur best fyri, og Fram, sum eru klárir at taka við, um Fleyr snávar.

Fleyr fór til Sørvágs við sjálvsálitinum í lagi. Seinastu tveir innanhýsis dystirnar móti SÍ hevði Fleyr nevniliga vunnið og tað gjørdi ikki útlitini verri, at SÍ seinasta vikuskiftið tapti móti ÍF.

Hetta var kortini ikki nóg mikið og Jan Hentze, leikandi venjari hjá Fleyr staðfestir, at teir ikki vóru nóg góðir henda dagin. Fleyr fylgdi væl við í fyrsta og øðrum setti, men í teimum seinnu var tað SÍ, sum setti dagsskránna.

- Í fyrsta setti vóru vit enn tá framman fyri við 23-20, so tú kanst gott siga, at vit sjálvir lorkaðu okkum sigurin av hondum, sigur Jan um leikligu gongdina.

Í øðrum setti gekk tó betri hjá Fleyr. Spælið hekk betri saman og verjuspælið koyrdi stak væl. Tað stutta av tí langa var, at Fleyr vann hetta setti, og tí sá út til, at tað kanska skuldi fara at eydnast at vinna dystin.

Men so varð ikki. SÍ — og serliga Rajko Petrovic — komu fyri seg aftur, og tá avtornaði høvdu sørvingarnir vunnið ein rættiliga greiðan 3-1 sigur. Seinastu tvey settini kundi so einki sigast til at SÍ vann, heldur Jan.

- Sørvingarnir spældu í hesum báðum settunum væl betri enn vit gjørdu. Serliga Rajko spældi væl. Eg haldi ikki at hann tapti ein tann einasta bólt, sigur Jan um tveirmetur mannin hjá sørvingum.

Úrslitið av dystinum í Sørvági hevur við sær, at eingin meistari er funnin enn, og at vit tí skulu til seinasta leikdag fyri at finna ein meistara. Tað er framvegis Fleyr, sum hevur bestu kortini á hondini, men Fram kann framvegis stjala meistaraheitið fyri nøsini á grannunum. Og neyvan nakað hevði kenst teimum betri.



*Fleyr hevur enn ikki tryggjað sær meistaraheitið. SÍ sýndist hesa ferð ov sterkt fyri havnarmenninar, sum nú skulu basa Mjølni, um meistaraheitið skal gerast veruleiki*

Hetta eru Fleyr leikararnir greiðir um og tí fara teir at stríðast sum úlvar tá teir fara á vøllin í seinasta dystinum móti Mjølnir.

- Trupulleikin er, at vit langt síðani eru útnevndir at vera meistarar av tí at vit »bara« hava Mjølnir seinasta dyst. So einfalt er tað ikki, tí talan er um ein klassikara og í einum slíkum kann alt henda. Spurningurin er eisini um Trygvi er klárur aftur, tí er hann tað er talan um eitt heilt annað Mjølnir lið enn tað sum vit hava sæð í seinastuni, sigur Jan

Fleyrvenjarin ivast ikki í, at hansara leikarar eru uppsettir at vinna, men hann veit samstundis, at mótstøðuliðið kemur til Havnar fyri at gera teimum fortreð. Kortini vónar hann, at tað fer at eydnast at vinna, kanska serliga tí, at felagið fyllir 25 ár í ár.